# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt tak fyri mannarættindi

Amnesty International, Føroya deild fer 19. februar at skipa fyri Kinakvøldi í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har tað fer at verða víst á mannarættindabrot í hesum landi. Felagsskapurin hevur fyrr í tíðindaskrivi víst á mannarættindabrot, sum verða fram í Kina, ið skjótt skal hýsa olympisku leikunum. Orðaskiftið um mannarættindini í hesum stóra landi hevur av álvara tikið seg upp í hesum sambandi og hava mong tosað um at boykotta leikirnar, um ikki myndugleikarnir gera nakað fyri at betra um mannarættindini.. Í grannalondum okkara verður talað um tiltøk og hava eitt nú fleiri danskir fólkatingslimir kunngjørt, at teir boykotta leikirnar. Alt fleiri krevja, at danski krúnprinsurin skal halda seg burtur, onnur krevja, at hann skal fara til Beijing, men at hann skal mótmæla brotini á mannarættindi í vertslandinum.

Amnesty er ídnasti felagskapur at gera vart við støðuna í Kina. A.I. hevur síðani tað var kunngjørt, at Olympisku leikirnir skulu haldast í Kina, lagt trýst á kinesisku myndugleikarnar og Altjóða Olympisku nevndina um at betra um mannarættindastøðuna. Felagsskapurin hevur í hesum sambandi gjørt fleiri frágreiðingar um framhaldandi mannarættindabrotini í Kina. Felagsskapurin ger vart við, at mannarættindi og virðing fyri tí einstaka eru grundarsteinar undir leikunum. Altjóða Olympiska nevndin hevur tí skyldu til at minna kinesisku myndugleikarnar á at liva upp til Olympisku samtyktirnar.

Amnesty vísir á, at hóast batar eru at hóma á nøkrum økjum, eru enn nógvir trupulleikar. Kinesisku myndugleikarnir eru til dømis farnir í gongd við at "rudda" Beijing áðrenn leikirnar og hetta hevur við sær, at biddarar og heimleys verða dømd til "enduruppaling gjøgnum arbeiði". Afturat hesum kemur, at stór fjøld av sonevndum "migration workers" verða riknir úr høvðusstaðnum, meðan leikirnir eru. Hesir arbeiðsmenn, ið uppihalda týðandi pørtum av eitt nú byggivinnuni, búgva undir sera vánaligum umstøðum, eru illa løntir og sleppa ikki at flyta bústað til høvuðstaðin. Teir hava sostatt familjuna eftir á landsbygd og sleppa ofta bert at vitja heima einaferð um árið. Hesir arbeiðarar fáa sostatt fíggjarligan miss, umframt at vera fyri mannminkandi viðferð. Hetta er serstakliga andstyggiligt, tá hugsað verður um, at hesir menn hava bygt flestu olympisku verkløgini og hotellini.

Alt hetta eru álvarslig mannarættindabrot, ið - um tey sleppa at halda áfram - oyðileggja umdømið hjá bæði Olympisku leikunum og hjá Kina. Kinesisku myndugleikarnir skulu skunda sær at bøta um støðuna, um teir skula liva upp til lyftini, ið teir góvu, tá søkt varð um leikirnar og demokratiski heimurin hevur her eitt gott høvi at taka eitt tak fyri mannarættindini.. Tiltakið í Miðlahúsið fer at varpa ljós á nakað av hesum.

**Sosialurin**

## Føroya Banki - ein fúl skomm fyri nýggju eigararnar av bankanum

**EYÐFINN LAMHAUGE**
Hoyvík

Tað var syndarligt at síggja ein av stjórunum í Føroya Banka standa í Sjónvarpinum og 'hella vatn út úr oyrunum' tí annað kundi hetta valla kallast. Tann eina umberingin fyri og onnur eftir.

Hann segði seg harmast støðuna fólk vóru komin í. Men hví eru fólk komin í hesa støðu? Jú um Føroya Banki ikki hevði verið so djúpt vavdur inn í hesa byggiætlan, og fólk tí høvdu álit á henni, so høvdu tey flestu helst havt tikið seg út, longu tá fyrra leiðslan var sett frá, og tá hevði skaðin bara verið hálvur.

Bankastjórin førdi fram, at Føroya Banki bara fíggjaði og annars einki hevði við byggingina at gera og samanlíknaði hetta eisini við, tá ein byggir eini sethús, tí tá er eigarin byggiharri og hevur ábyrgdina.

Eg rokni við, at tey flestu, hóast tey eru amatørar, hava betri eftirlit við byggingini av sínum húsum, enn hesin stóri "professionelli" bankin, sum hevur átikið sær at fíggja eina byggiætlan fyri 150-200 mió., hevur havt av hesi byggiætlan.

Hví, ella hevur bankin ikki alla tíðina fylgt við, um nýtslan av peningi svarar til tað arbeiði, sum er gjørt?

Bankastjórin legði eisini ein stóran part av skuldini yvir á undirveitarar, sum ikki kláraðu sína uppgávu. Men hevur bankin, áðrenn hann fer undir at fíggja eina so stóra byggiætlan, ikki syrgt fyri at kanna undirveitarar, og um neyðugt krevja trygd fyri, at hesir klára at gera arbeiðið liðugt á ein nøktandi hátt?

Her eru eisini fleiri onnur sera løgin ting. Tá bankin setir fyrru leiðsluna frá, veit hann tá ikki hvussu støðan er? Hevur hann ikki longu tá gjørt eina djúptøkna kanning av fíggjarviðurskiftunum, ella er nøkur onnur orsøk til at leiðslan verður skift?

Hvussu ber tað til, at bankin letur nakrar eigarar flyta inn í desember fyri tann avtalaða prísin, tá hann veit, at nógvir pengar koma at mangla í?, meðan onnur ein mánað seinni skulu gjalda 250 tús. meira.

Var hetta ikki ein felags byggiætlan? Og áttu so ikki øll at verði viðfarin líka?

Eg nokti at trúgva, at Føroya Banki nústani hevur finnið útav, at tað mangla 10-20 mió. í. Og um hann ikki hevði villleitt fólk, so kundu tey longu havt trekt seg út seinasta summar og spart hópin av rentum, og haraftur-at tá fari í gongd við at funni aðrar bústaðarloysnir.

Bankastjórin segði eisini, at hann metti tað vera skilabest, at lata sama sakførara halda fram, tí hann kendi alt byggimálið. Ja, tað er so rímiligt, at hann sum hevur staðið í fremstu røð undir allar byggigøluni,líka frá at fyrsti sáttmálin bleiv skrivaður og til ídag, sleppur at halda áfram. Men at hesin kemur sær, tað skilji eg ikki, ein skal vera meira enn óforskammaður. Hetta man vera tað, ið tey kalla 'typiskt føroyskt'.

Bankastjórin segði, at Føroya Banki hevði gjørt eina bjargingarætlan – hvønn man henda bjargingarætlan fyrst og fremst vera ætlað til?, neyvan keyparunum av íbúðunum Undir Grásteini.

Landspolitikkarar hava nú í longri tíð tosa um alternativar íbúðarloysnir og minni íbúðir, men tá ein so stórur banki sum Føroya Banki ikki klárar at stýra fíggingini av einari slíkari byggiætlan. Hvussu skal nakar so framyvir hava álit og tora at skriva undir byggisáttmálar, tá tað snýr seg um størri byggiætlanir. Hevði tað ikki verið eitt hugskot, at landsmynduleikarnir fóru inn og kannaðu eina byggiætlan sum hesa, og funnu útav, hví tað altíð gongur galið, tá størri byggiætlanir verða gjørdar í Føroyum, og ósek fólk tí verða drigin út á sjógv. Og so evtl. gjørt reglur sum vardu keypararnar.

Um nakað í øllum hesum er ólógligt veit eg ikki, men tað kann ikki svitast, at moralskt og sømuligt er tað langt av leið, tá hesin stóri bankin turkar sín ódugnaskap uppá onnur, sum ongan møguleika hava havt at fylgt við byggi- og fíggjargongdini undir hesi stóru byggingini.

Men eftir íbúðargøluna Undir Grásteini, kann í hvussu so staðfestast, at bæði Føroya Banki og hansara sakførari so dyggiliga hava víst øllum Føroya Fólki, sín ódugnaskap.

# Smyril slapp ikki at bryggju

**Nógvi vindurin bar við sær, at skiparin á Smyrli helt tað ikki vera ráðiligt at leggja at bryggju í Havn**

**SAMFERÐSLA**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Smyril var annars farin úr Suðuroy sum vant klokkan 7 í morgun, men sum veðrið versnaði, gjørdist tað vónleyst at leggja at bryggju í Havn.

- Vit fáa ikki gjørt so nógv annað í løtuni. Skiparin metir, at tað er als ikki forsvarligt at leggja at bryggju í Havn, so vit vóna, at veðrið batnar út á seinnapartin, segði Bogi Mortensen, samferðsluleiðari hjá Strandferðsluni, við Rás2 í dag.

Um møguleikan at leggja at bryggju aðrastaðni, segði Bogi, at tað málið høvdu teir ikki tikið avgerð um.

- Trupulleikin er jú eisini, at so nógvar avlýsingar eru hjá bygdaleiðum. Og tí hjálpir tað ikki ferðafólkunum tað stóra, um vit skuldu lagt at aðrastaðni. Og ferðafólkini hava tað gott. Men tey verða so noydd at bíða nakað. Tað verður sagt frá betri veðri út á seinnapartin, so vónandi fer tað at halda, segði Bogi Mortensen.

Eisini rakti nógvi vindurin Sam og Teistan, sum avlýstu sínar ferðir. Teistin sigldi nakað óreguliga í morgun, men síðani varð støða tikin til, at siglingin varð steðgað.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.